BRIDGE
Opið hús í Bridgehúsinum hvønn sunnudag kl. 14.00. Vinningar til vinnandi parið. Minimum trý borð.
Rói & Johannes

HEIMSINS BESTA
KOMPAKTKAMERA. Eitt so gott sum óbrúkt Contax T2 kamera við Zeiss linsu til sølu. Fototólið er 2 ára gamal og hevur bert tikið nakrar fáar filmar.
Ringið 223143

JÓLAVEITSLAN 2001
Árliga jólaveitslan hjá Miðnámsskúlanum í Suðuroy verður í ítróttarhøllini í Trongisvági tann 15. des. Allir gamlir næmingar eru vælkomnir! Til ber at ringja eftir atgongumerkjum á tlf. 221223 (norðara helvt) og tlf. 250505 (sunnara helvt). Atgongumerkið kostar 170 kr. Dansurin við Eini Blanding er íroknaður. Seinasta freist at keypa atgongumerki er tann 5. des.
3.S

SOLARIUM
Lítið brúkt solarium fæst við at yvirtaka leiðusáttmálan, har bert tvey ár eru eftir. Hevur koyrt í uml. 700 tímar total.
Meir fæst at vita á tlf. 216364

SKEIÐ
Skeið í at gera jólaprýði verður í Losjuni í Gøtu 9. desember kl. 15.00-18.00. Tilmelding á tlf. 457098/441233.
Signy Birgittudóttir

TIL SØLU
Vakra Rosenborg-stelliá úr kongaligum porcelæni er til sølu fyri 3.000 kr. Við í stellinum eru: 24 koppapør við kakutallerkum, sukurskál, mjólkarkrúss, kakuføt, smørskálir, øskubikar og kaffikanna
Tlf. 316099

TIL SØLU
Ein Philips luftreinsari, sum er góður fyri allergi, royk, astma og annað.
Tlf. 260964

SÓL TIL SØLU
Lítið brúkt dupult sól bíliga til sølu.
Tlf. 422141

TIL SØLU
Ein Siemens SL 45 fartelefon við eykaútgerð til sølu fyri 2800 kr.
Tlf. 211439

EFTIRLÝSING
Er tað nakar, ið eigur sjónvarpsrøðina »Rødder« á bandi? Eg hevði verið fegin um eg kundi lánt hana.
Tlf. 224033 - 317332

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Fæst nú til keyps kring landið

Við Tónleiki 2001 ber tað til at koma tættari at føroyskum tónleiki enn nakrantíð áður. Tú sleppur á pallin, aftur um pallin, inn í upptøkuhølini og á ferð uttanlands við bólkum. Tú hittir tónleikararnar, sum tað snýr seg um, og teir siga frá, hvussu teir upplivdu ymsar hendingar í árinum. Eitt umfatandi yvirlit yvir hendingar og útgávur í árinum eru eisini í bókini.

Árbókin er 116 síður til støddar, og alt er í litum. Í bókini eru nógvar myndir, sum ikki hava verið frammi áður.

Sosialurin & pop.fo

Jólahugni

verður fríggjadagin 7. desember kl. 17.00 í Losjuni

Okkurt gott verður á borðinum

Petur Jacob Sigvardsen lesur jólaevangeliið

Beinta Háberg situr við klaverið - vit syngja kendu jólaløgini.

Upplestur



Losjan í Havn

Øll hava eina góða síðu – vit hava pop.fo

HEILSANIR

Góða, fitta, pena, kjera Fríðhild
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum, ið var í gjár, 3. desember. Nú ert tú komin í besta aldur (tsk tsk). Vit ynskja tær nógv góð og spennandi ár í framtíðini. Øll tey bestu ynski í verðini frá
Bindiklubbanum

Góða Ruby Sandra
Hjartaliga tillukku við 13 ára degnum ynskja **vit í húsinum**

Góða Hjørdis Maria
Hjartaliga tillukku á 10 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsan til kok-abban frá
Rana og Eyðstein

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við gávum, fjarritum, blómum og heilsanum, gjørdu silvurbrúdleypsdag okkara 4. nov. 2001 ógloymandi og hugnaligan. Ein serstøk tøkk til børnini og tykkum øll, sum hjálptu til. Takk til kokkar og servitrisur.
Heilsan, Elsa og Birgar

Góði, elskaði Atli!
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 1. des. Vit elska teg.
Heilsan, mamma og babba

Góða Paula
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 1.12. Alt tað besta í framtíðini.
Heilsan Mirian og Frans

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**